# Vestmanna kommuna mótmælir

**Borgarstjórin í Vestmanna kommunu, Karl A. Olsen, heitir á landsins myndugleikar um at forða, at sýslumaðurin í Vestmanna flytir til Havnar**

FLYTING
*Páll Holm Johannsen*
*pall@sosialurin.fo*

- Tað tykist løgið, at fútin, sum er danskur embætismaður, hevur so stórt vald í Føroyum 2005. Skuldi tað ikki verið føroyskir politikarar, sum gjørdu av, hvussu vit skipa samfelagið, so tað hóskar best til okkara umstøður? Hví mótmæla løgtingslimirnar fyri Norðurstreymoy ikki harðligari, nú almenn arbeiðspláss hvørva úr økinum og tænastustøðið hjá íbúgvunum lækkar?

Borgarstjórin í Vestmanna, Karl A. Olsen, hevur í bløðunum í dag eitt lesarabræv, har hann harðliga mótmælir ætlanini hjá fútanum at flyta sýslumannin í Vestmanna til Havnar.

Hann ivast stórliga um tað er nøkur sparing, at sýslumaðurin í Vestmanna flytir til Havnar.

- Tað er neyvan nøkur sparing í at flyta sýsluskrivstovuna til Havnar, tí danski staturin eigur bygningin. Heldur skuldi tað verið ein fíggjarligur fyrimunur at flutt fleiri uppgávur á bygd. Grundstykkir eru bíligari, húsaprísir og leigukostnaður eru væl hægri

Borgarstjórin vísir á, at tað er eingin ivi um, at tænastustøðið hjá íbúgvum og vinnulívið fer at lækka um sýsluskrivstovan verður flutt.

- Í staðin fyri at verra tænastustøðið hjá vinnulívinum og borgarunum í Vestmanna og pørtum av Kvívíkar kommunu skuldi tænastustøðið hækkað, skrivar Karl A. Olsen.

Í lesarabrævinum hjá borgarstjóranum í Vestmanna kommunu er ein innarlig áheitan á landsins myndugleikar um at forða fyri, at sýsluskrivstovan verður flutt.



*Modellmynd: Bárður*

Sýslumaður til Havnar:

# Tænastan versnar munandi

**- Sjálvsagt verður tað truplari hjá borgarunum at fáa síni mál avgreidd í Havn, enn um vit framvegis høvdu havt okkara egna sýslumann. Tað fer eisini at fara við nógvari tíð og orku hjá fólki at ferðast til Havnar fyri at fáa síni mál avgreidd. Stutt sagt verður talan um eina væl lægri tænastu, heldur Heidi Petersen, løgtingskvinna**

FLYTING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Skráseting av skipum og bátum. Mynstring av sjófólki. Brúðarvígslur. Skiftisrættarsakir. Grind og grindabýti. Náttúrufriðingar. Ættleiðing. Auktiónir. Sjófrágreiðingar. Deyðsbúgv.

Ja listin yvir uppgávur, sum ein vanligur sýslumaður røkir, er langur. Stendur tað til ovastu leiðsluna hjá føroysku løgregluni missa borgarar í Vestmanna sín sýslumann í næstum, tí fútin metir, at arbeiðsorkan hjá sýslumanninum í Vestmanna verður betur nýtt á politigarðinum í Havn enn í Vestmanna.

Heidi Petersen er ættað úr Vestmanna og er løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin. Ikki heilt óvæntað heldur hon lítið um avgerðina hjá fútanum.

- Vit eiga sjálvsagt at varðveita tær fáu almennu tænasturnar, sum ikki eru í Havn, úti í økjunum, so tætt borgarunum sum gjørligt, sigur hon

*Veit fútin ikki best, hvussu løgreglan skal skipast?*

Jú, hann veit óivað best um hugsað verður um reinar politiuppgávur, men hvat við øllum teimum tænastum, sum eru knýttar at politistøðunum? spyr Heidi Petersen.

Løgtingskvinnan greiðir frá, at Tjóðveldisflokkinum er av teirri áskoðan, at føroyska løgreglan eigur at vera kring alt landið, heldur enn at verða miðsavnað á smáum eindum, tí talan er um eina ómetaliga týdningarmikla tænastu fyri borgaran úti í økjunum.

*Hvør væntar tú avleiðingin verður fyri borgararnar í Norðstreymi, um sýslumaðurin í Vestmanna flytir til Havnar?*

- Sjálvsagt verður tað truplari hjá borgarunum at fáa síni mál avgreidd í Havn, enn um vit framvegis høvdu havt okkara egna sýslumann. Tað fer eisini at fara við nógvari tíð og orku hjá fólki at ferðast til Havnar fyri at fáa síni mál avgreidd. Stutt sagt verður talan um eina væl lægri tænastu, heldur Heidi Petersen.

### Yvirtakið

Sjálvsstýrissamgongan seinasta valskeið arbeiddi við at yvirtaka løgregluøkið, men rakk ikki málinum, áðrenn løgtingsval varð útskrivað í úrtíð. Sitandi samgonga hevur ikki valt at raðfesta yvirtøkuna av løgregluna eins høgt og undanfarin samgonga.

Hetta harmar Heidi Petersen, tí so høvdu føroyingar sjálvir kunna skipað løgregluna sum teimum lystir, heldur enn at lurta eftir harraboðum frá einum donskum stovni, heldur hon.

- Hetta málið er enn eitt dømi um, at vit hava einki at skula hava sagt. Høvdu vit havt evstu ábyrgd á løgregluni høvdu vit kunnað skipað føroysku løgregluna eftir tí leisti, sum vit føroyingar hildu vera skilabest, heldur Heidi Petersen.

# Nepper verið ómetaliga kúrrur

**Tingmaður sambandsfloksins í Norðstreymi, Olav Enomoto, fýlist á, at fútin, Mogens Nepper Christensen, hevur verður so fámæltur í málinum um flytingina av sýslumanninum í Vestmanna til Havnar**

FLYTING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

- Fútin hjá okkum er ein fittur og fryntligur maður, men hann er samstundis rættiliga friðarligur av lyndi, og við sínum framferðarhátti leggur hann ótilvitað upp til stríð í málinum.

Sambandstingmaðurin, Olav Enomoto, er ikki nøgdur við handfaringina av málinum um flytingin av sýslumanninum í Vestmanna og tveimum politistum úr Vágoynni til Havnar. Tingmaðurin úr Norðstreymi heldur ikki, at hann hevur fingið neyðugu kunningina frá fútanum í málinum.

- Eg havi fleri ferðir roynt at forhoyrt meg um grundgevingarnar hjá fútanum, men tað hevur verið ómetaliga trupult at fáa nakað at vita. Fútin hevur verið ómetaliga friðaligur í málinum, og tí standi eg framvegis rættiliga spyrjandi, sigur Olav Enomoto.

Tingmaðurin heldur tað er undrunarsamt, at tað ikki ber til at fáa nøkur tøl á borðið.

- Grundgevingin hjá fútanum hevur verið, at tað meira rationelt fyri løgregluna, at sýslumaðurin verður fluttur til Havnar. Rationalisering er eitt búskaparligt hugtak, og tí er tað merkisvert, at tað ikki ber til at fáa nøkur upplýst, tí eg hava roynt at fingið tey fleiri ferðir, sigur Olav Enomoto.

### Góð høli

Olav Enomoto dylir ikki fyri, at hann er ógvuliga harmur um, at sýslumaðurin úr Vestmanna flytir til Havnar at arbeiða. Hann vísir á, at hølini, sum sýsluskrivstovan í Vestmanna heldur til, eru rættiliga rættiliga væl útgjørd.

- Mín grundgeving í málinum hevur alla tíð verið, at góðu umstøðurnar í Vestmanna áttu at havt við sær, at fleiri økið verið flutt til Vestmanna og ikki umvent. Tað er ein andsøgn at flyta sýslumannin og skrivstovufólkið úr Vestmanna til Havnar, tá tað er ein sannroynd, at løgreglan í Havn hevur trupulleikar bara at húsast í politigarðinum, og er noytt at leiga seg inn aðrastaðni í býnum, heldur Olav Enomoto.